# Tveir HR bátar millum tríggjar teir fremstu

**Sílið var mest sannførandi vinnarin í Vági, og tað er sera ilt at ímynda sær, at nakar skal fanga Sílið í ár**

5-MANNAFØR GENTUR
*Jóannes Hansen*



*Genturnar á Sílinum eru nógv besta manningin hjá gentunum í ár, og tær staðfestu eisini hendan veruleikan á jóansøku*

*Mynd: Áki Bertholdsen*

Tað er eingin ivi. Sílið vísti leygardagin í Vági, at tær eiga nógv tað bestu manningina í kappingini í ár. Sílið var beinanvegin millum fremstu bátarnar, munurin til teir næstu bara øktist, og á málinum var Sílið meiri enn eina bátslongd undan Fípuni Føgru. Sílið var kanska tann mest sannførandi vinnarin av øllum í Vági.

Í fjør vann Fípan Fagra allar róðrarnar uttan á ólavsøku. Í ár hevur Fípan Fagra við einum undantaki verið næstfremst, og tað vóru klaksvíksgentur aftur hesa ferð. Men tað skal heilt nógv til, um tað skal eydnast hjá Fípuni Føgru at vinna ein sigur í ár.

Tað gongst væl hjá Havnar Róðrarfelag. Tað sást m. a. aftur í, at umframt vinnarabátin, so var bronsuvinnarin hesa ferð úr HR. Drekin var tað mesta av einari hálvari bátslongd frammanfyri Blik av Argjum. Harvið vann Drekin besta úrslitið higartil í ár.

Hóast tað tykist rættuliga greitt, hvørjir fremstu bátarnir eru í øllum kappingunum, so er tað merkisvert, hvussu stórur áhugin fyri at luttaka í kappróðrinum er hjá gentunum.

Ofta hevur tað víst seg, at alt fleiri manningar fella frá, sum róðrarárið líður, og úrslitini ikki vísa seg at vera tey, sum luttakararnir sjálvandi vóna, at tey skulu vera. Soleiðis er tað ikki í kappingini millum gentur. Fjúrtan manningar luttóku í Vági, og tað er framúr.

At kappingin gongur fyri seg í fleiri røðum sást væl í Vági. Genturnar umborð á Firvaldi vóru hjartans fegnar um, at tað hesa ferð eydnaðist teimum at sleppa undan aftasta sessinum, og ungu genturnar umborð á Teklu úr Klaksvík fegnaðust um, at tað hesa ferð eydnaðist teimum at gerast nummar níggju. Tær hava ikki verið so frammarlaga áður.

# Smyril vardi borg fyri vágbingar

**Fagnaðurin var sera stórur, tá tað var greitt, at vágbingar høvdu vunnið teirra kapping**

6–MANNAFØR MENN
*Jóannes Hansen*

Fer tað at eydnast hjá Smyrli at endurtaka bragdið, sum teir gjørdu á Skálafjørðinum, og sum teir endurtóku í Hósvík. Tað var stóri spurningurin í Vági í síðstu viku.

Tí kundi tað kanska roknast við, at ungu menninir umborð á Smyrli kendu eitt sindur av trýsti á sær, tá teir lógu undir grótkastinum á sunnara landinum og bíðaðu eftir startskotinum.

Ofta bera trýst og nervar við sær, at avrikið ikki verður tað, sum tað annars hevði verið møguleiki fyri. Soleiðis var tað ikki hjá Smyrla monnunum. Tað var skjótt, at teir løgdu seg á odda, og fagnaðurin vildi ongan enda taka, tá tað varð staðfest, at Smyril hevði vunnið við einari lítlari bátslongd. Onkur, sum ikki áður hevði verið til kapproður, spurdi, um fagnaðurin og gleðin yvir ein sigur altíð var soleiðis, sum tað sást í Vági leygardagin. Svarið var, at hetta var nakað heilt serligt, og soleiðis var tað.

Nú skal vilja heilt illa til, um Smyril ikki skal vinna FM. Fyritreytirnar styrknaðu eisini tí, at Páll Fangi, sum vann á norðoyarstevnu og annars hevur verið størsti kappingarneytin hjá Smyrli, hesa ferð fekk ein vánaligan start. Gongurólvur, sum ikki hevur staðið seg so væl, sum tað kanska kundi roknast við, at ein nýggjur bátur hjá Havnar Róðrarfelag fór at gera, kroysti seg fram um Páll Fanga. Munurin teirra millum var størri, enn hann var frá Páll Fanga og aftur til Stráluna, sum var frammanfyri hálvan Páll Fanga.



*Tað var ikki sørt, at vágbingar vóru ernir eftir jóansøkuna. Teir vunnu á heimasjógvi og eru klárt á odda í samlaðu støðuni*

# Jarnbardur vinnur hvørja ferð

**Avrikið hjá Riddaranum ger, at miðvingar kanska kunnu vóna, at tað fer at bera til hjá teimum at vinna ein róður í heimasjógvi**

6-MANNAFØR KVINNUR
*Jóannes Hansen*

Annan leygardag verður tað kappróður í Miðvági. Miðvingar hava ikki staðið seg nakað serliga væl í kappingini í ár. Á mannfólkasíðuni eru teir púra sørir. Á kvinnusíðuni hevur tað gingið betri og betri hjá Riddaranum.

Á jóansøku var Riddarin aftur næstfremstur. Nú hevur Riddarin sama stigatal sum Páll Fangi, og um tær síðstu kappingarnar skulu nýtast sum grundarlag fyri metingunum um komandi kappingarnar, so má Riddarin metast at vera favorittur til at vinna silvurmerkini.

Jarnbardur er so at siga FM vinnari, og aftur í Vági sýndu kvinnurnar í róðrarfelagnum Knørri, at tær eru so nógv best fyri í ár. Veteranurin í rongini, Jannie D. Jacobsen, eigur kanska ikki so nógva rødd eftir, men hon megnaði so at píska sína manning til sama avrikið, sum tær hava sýnt í øllum hinum kappingunum.

Á málinum var Jarnbardur eina bátslongd frammanfyri Riddaran, sum aftur var eina bátslongd undan Gongurólvi. Hesir fýra bátarnir róðu so at siga í einari kapping fyri seg sjálvar. Lómur, Snopprikkur, Víkingur og Hvessingur vóru væl aftari.

FM spurningurin tykist vera avgreiddur. Spenningurin nú snýr seg um, um tað fer at eydnast Riddaranum í heimasjógvi at gera nakað við Jarnbard!

# Sílið vann og spenningurin øktist

**Hóast teir endaðu á triðja plássinum hesa ferð, so eru dreingirnir á Fípuni Føgru framvegis á odda í kappingini um FM**

5–MANNAFØR DREINGIR
*Jóannes Hansen*

Havnardreingir umborð á Sílinum hava dyggiliga vaskað stóra kiksaran á Skálafjørðinum burtur. Ta ferðina vórðu teir kolldømdir, tí teir fingu tvey gul kort í sama róðri. Síðani vunnu teir í Hósvík, og tá teir leygardagin vóru í Vági, vístu teir aftur øllum avbjóðarunum aftur um seg.

Fípan Fagra vann tvær tær fyrstu kappingarnar í ár. Men tað var ikki frá bátinum úr Klaksvík, at Sílið fekk størstu kappingina leygardagin. Heldur var tað Blikur av Argjum, sum hevði hug at bjóða av. Tíðarmunurin millum Sílið og Blik var tvey sekund, sum er tað mesta av einari bátslongd. Tað vil siga, at sigurin hjá Sílinum var rudduligur. Blikur var eitt sekund undan Fípuni Føgru.

Fípan Fagra er framvegis fremst í FM kappingini. Teir hava 21 stig. Blikur hevur 19, og Sílið hevur 17. Tí er lagt upp til eina sera spennandi endakapping um FM heitið.

Úrslitini í Vági vóru soleiðis, at tað neyvan kann roknast við, at aðrir bátar enn hesir tríggir fara at blanda seg upp í kappingina um trý tey fremstu plássini. Havfrúgvin og Tjaldrið hava undanfarnu árini vunnið nógv. Hesir báðir bátarnir endaðu í Vági á ávikavíst fjórða og fimta plássinum, men munurin fram til Fípuna Føgru var meiri enn fýra sekund, sum er meiri enn ein bátslongd.

Um Sílið, Fípan Fagra og Blikur enda á trimum teimum fremstu plássunum, so verður tað avgerandi fyri, hvør skal hava FM heitið, um Fípan Fagra fer at megna at toga seg fram aftur á annað ella fyrsta plássið. Um Sílið fer at vinna bæði í Miðvági og á ólavsøku, so verða teir FM vinnarar. Men bara um teir fáa hjálp frá Bliki, sum skal halda Fípuna Føgru aftanfyri seg.

Blikur hevur ikki vunnið higartil, men hann hevur framvegis møguleika at vinna FM. Tó ber tað honum nevyan til at vinna FM, um hann ikki vinnur í hvussu so er annan av róðrunum, sum eru eftir – um Sílið og Fípan Fagra báðu ferðirnar verða ímillum tríggjar teir fremstu á mál.



# Gunnar vann á Jóansøku



*Gunnar Dahl Olsen vann kappingina á jóansøku, men samanlagt er hann á øðrum plássi*

*Mynd: Áki Bertholdsen*

**Gunnar Dahl Olsen vann jóansøkusúkklingina, men hann fekk harða mótstøðu frá Eli Christiansen, og í samlaðu støðuni er støðan nú rættiliga spent**

**Súkkling**
*tíðindaskriv*

Aftur í ár var skipað fyri kappsúkkling á jóansøkuni í Vági. Eins og hini árini, var byrjað á Niðara vegi við skúlan/kirkjuna, og var súkklað til høgru niðan Krosslábrekkuna, til høgru út eftir Ovara vegi til krossin í Ovari-Niðari vegur, har aftur verður sneitt til høgru eftir Niðara vegi, og til málið við skúlan/kirkjuna.

Kappingin er ein sokallað býarsúkkling t.v.s. at súkklað var í 40 min, so ringdi ein klokka og súkklararnir súkklaú eina síðstu umferð, og fyrsti maður um málstrikuna vinnur kappingina, sjálvandi treytað av at hann hevði súkklað flestar umferðir.

Ikki óvantað vann Gunnar Dahl Olsen, og vóru tað drúgvu royndir hansara, ið gjørdu at hann slapp leysur frá Eli Christinnsen, sum hevur tikið ótrúliga nógv fram seinasta árið, og sum um stutta tíð verður ringur at basa, sjálvt hjá Gunnari. Jens Sigurd Simonsen kom um málstrikuna sum nummar trí, eitt úrslit, sum vísir at hann eisini er ein súkklari ið dugur er í

Gunnar, Eli og Jens Sigurd vóru ein fittan tein framman fyri hinar fýra, ið komu á mál sum perlur á snóri, ein av hesum var unglingurin Dánjal Michaelsen, sum vísti at hann er førur fyri at fylgja við teimum bestu tær 30 ferðirnar niðan Krosslábrekkuna, tyngsta súkkluteinin í Grand Prix kappingunum.

**Barnasúkklukapping**

Sum nakað nýtt á jóansøku var eisini ein barnasúkklukapping. Hendan kappingin var ein partur av teimum barnasúkklukappingunum, ið hava verið á undanfarnu FM-stevnunum, og eru tær skipaðar eftir Grand Prix skipanini.

Til kappingarnar vóru børnini bólkaði eftir aldri og kyni:
**1 Bólkur 1: 6-7-8 ár.**
**2 Bólkur 2: 9-10-11 ár.**
**3 Bólkur 3: 12-13-14 ár.**

Børnini í bólki 1 og 2 súkklaðu kring Vatnið, bólkur 1 súkklaði tvær ferðir og bólkur 2 súkklaði fimm ferðir.

Hjá 3. bólki var skipað fyri tíðasúkkling, og var henda av Vágseiði til Lopra og aftur á Vágseiðið. Ein teinur upp á 10 km.

**Dreingir 12 til 14 ár:**

| Nr. | Navn | Tíðin |
|---|---|---|
| 1 | Hans Krosstein | 18.33 |
| 2 | Bergur Johansen | 24.18 |

**Dreingir 9 til 11 ár:**
1 Finnur Mellemgaard
2 Poul Andr
3 Rani G. Jacobsen
4 Jens Pauli Johansen

**Dreingir 6 til 8 ár:**
1 Rani Johansen

**Gentur 6 til 8 ár:**
1 Anja Zachariassen

**Samlaða støðan**

| | | 1. umf. | 2. umf. | 3. umf. | 4. umf. | Íalt |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Eli Christiansen | 34 | 34 | 34 | 34 | 136 |
| 2 | Gunnar Dahl-Olsen | 40 | 40 | - | 40 | 120 |
| 3 | Dánjal Michaelsen | 23 | 16 | 20 | 23 | 82 |
| 4 | Esmar Joensen | 30 | 20 | 30 | - | 80 |
| 5 | Sverri M. Edvinsson | - | 30 | 40 | - | 70 |
| 6 | Beinir Rasmussen | - | 26 | 26 | - | 52 |
| 7 | Evald Rasmussen | 26 | - | - | 26 | 52 |
| 8 | Jens S. Simonsen | - | 18 | - | 30 | 48 |
| 9 | Kári Simonsen | - | 23 | 23 | - | 46 |
| 10 | Geyr Gilsteinsson | 20 | - | 18 | - | 38 |

# Rumenarnir kunnu royna seg

**Bæði heimaliðið á Skála og gestirnir úr B68 hava ryggin ímóti múrinum undan dystinum í kvøld**

SKÁLA–B68
*Jóannes Hansen*

Síðsti dysturin í níggjunda leikumfarinum verður spældur í kvøld. B68 spældi í Intertoto Cup leygardagin. Tí var dysturin hjá teimum á Skála útsettur til í kvøld.

Skála hevur bara tvey stig. Teir hava ikki vunnið í átta teimum fyrstu umførunum. Tí er neyðugt hjá teimum at fáa stig burturúr í kvøld.

Kári Nielsen hevur gingið á høkjum síðani hóskvøldið, tá hann varð skaddur undir venjing. Pauli Hansen er framvegis so mikið skaddur, at hann fær ikki vant, og Rúni Rasmussen er leikbannaður eftir útvísingina á Tvøroyri.

Øll viðurskifti kring teir tríggjar rumenarnar eru komin upp á pláss nú. Spurningurin er so, um Mathias Davidsen fer at geva teimum møguleikan í kvøld. Allir sleppa neyvan at royna seg, men tað er møguligt, at miðvallarin og álopsmaðurin sleppa upp í part. So fæst at síggja hvør dugur er í teimum.

Hjá B68 er neyðugt at fáa øll stigini, um teir framvegis skulu vera við í kappingini um fremstu plássini. Tá B68 var á Skála í bólkaumfarinum í steypakappingini, vunnu toftamenn 3–0.

Øssur Hansen var ikki við í Intertoto Cup dystinum, men hann verður við í kvøld. Í B68 hópinum er ein nýggjur maður í kvøld. Hann eitur Morten Skytte. Talan er um 23 gamla sonin hjá venjaranum, sum er í Føroyum í summarfrí. Hann hevur seinastu árini spælt við Glostrup FK í 2. deild. Har hevur hann fyri tað mesta verið í verjuni. Morten verður kortini ikki gamal á Toftum, tí hann skal heilt skjótt av landinum aftur.

# Støðurnar í FM-kappróðinum

**5-mannfør dreingir**

| | bátur | jóansøka | stig íalt |
|---|---|---|---|
| 1 | Sílið | 4 | 21 |
| 2 | Blikur | 5 | 19 |
| 4 | Fípan Fagra | 7 | 17 |
| 3 | Havfrúgvin | 3 | 12 |
| 5 | Tjaldrið | 2 | 12 |
| 6 | Drekin | 1 | 6 |
| 7 | Ørnin | | 1 |

**6-mannafør, kvinnur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Jarnbardur | 7 | 28 |
| 2 | Riddarin | 5 | 18 |
| 3 | Páll Fangi | 4 | 18 |
| 4 | Gongurólvur | 3 | 12 |
| 5 | Lómur | | 5 |
| 5 | Snopprikkur | 2 | 3 |
| 5 | Víkingur | | 3 |
| 6 | Hvessingur | 1 | 1 |

**5-mannafør, gentur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Sílið | 7 | 28 |
| 2 | Fípan Fagra | 5 | 19 |
| 3 | Drekin | 3 | 13 |
| 4 | Blikur | 1 | 12 |
| 5 | Havfrúgvin | 4 | 8 |
| 6 | Ørnin | 2 | 8 |

**6-mannafør, menn**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Smyril | 7 | 26 |
| 2 | Gongurólvur | 4 | 21 |
| 3 | Páll Fangi | 5 | 15 |
| 4 | Strálan | 2 | 12 |
| 5 | Hvessingur | 3 | 7 |
| 6 | Sølmundur | 1 | 7 |

**8-mannafør**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Kvívíkingur | 7 | 26 |
| 2 | Argjabáturin | 5 | 22 |
| 3 | Knørrur | 4 | 16 |
| 4 | Nevið Reyða | 2 | 10 |
| 5 | Húsavíkingur | 3 | 6 |
| 6 | Ørvur | 1 | 3 |
| | Kvívíksbáturin | | 3 |

**10-mannafør**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Vestmenningur | 5 | 22 |
| 2 | Eysturoyingur | 7 | 19 |
| 3 | Havnarbáturin | 4 | 19 |
| 4 | Klaksvíkingur | 3 | 16 |
| 5 | Nólsoyingur | 2 | 8 |